# Deyvaøkið framvegis við sviðusoð

**Útlitini til, at foreldur at deyvum børnum sleppa at læra teknmál, soleiðis at tey kunnu samskifta við síni børn, eru vánalig. - Hevði Sernámsdepilin fingið hálva aðru mió. krónur meiri komandi ár, enn fíggjarlógaruppskotið leggur upp til, høvdu vit raðfest deyvaøkið ógvuliga høgt, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum**

DEYVAVIÐURSKIFTI
*Turið Kjølbro*


*- Tá ið alt økið vantar pening, er tað ein ómetalig trupul uppgáva at gera av, hvørji øki skulu raðfestast og hvørji ikki, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum*

Verður uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri komandi ár samtykt í verandi líki, eru ikki útlit til, at øki, sum ikki verða raðfest høgt sum er, fáa hægri raðfesting komandi ár. Sernámsfrøðiliga virksemið í Føroyum tørvar 10 mió. krónur í meirjáttan um árið, skal tað virka nøktandi. Sernámsfrøðiliga virksemið í fólkaskúlanum fær tó eina hækking, sum munar eitt sindur, men burtur sæð frá tí verður lítil og eingin broyting til tað betra sambært fíggjarlógaruppskotinum.

Deyvaøkið er eitt øki innan sernámfrøðiliga virksemið, sum veruliga hevur kent sviðan av ov lítlari játtan. Í summar kendi einasti teknmálsfrøðiligi ráðgevin í Føroyum seg noydda at siga seg úr starvi, av tí arbeiðsumstøðurnar vóru ótolandi. Viðkomandi sat í hálvum starvi, men arbeiðsuppgávur eru til tvey fulltíðarstørv. Í kjalarvørrinum av hesum er eingin teknmálsfrøðilig ráðgeving í løtuni og tað sum verri er, foreldur at deyvum børnum fáa ikki upplæring í teknmáli, sum ger tey før fyri at tosa við síni børn. Felagið Hoyrnin hevur fleiri ferðir gjørt vart við ótolandi støðuna, men higartil til fánýtis.

Fær sernámsfrøðiliga virksemið ikki størri játtan komandi ár, verður virkandi stjóri á Sernámsdeplinum, Hans Eli Dahl, noyddur at taka dagar ímillum, hvørji øki innan sernámsfrøðiliga virksemið skulu raðfestast og hvørji ikki, og um tænastur skulu niðurleggjast.

- Tað snýr seg ikki um at finna nakrar tímar til nakrar deyvalærarar og læra teir deyvamál. Aðalspurningurin er fakliga røktin av økinum, sum krevur fleiri fólk í starvi. Tá ið umstøðurnar eru soleiðis sum tær eru, er uppgávan hjá okkum at finna út av, hvørjar tænastur vit kunnu bjóða og hvørjar ikki. Enn er avgerð ikki tikin um, hvør tænasta kann halda fram og hvør ikki. Øll økini eru týðandi, men vit verða kanska noydd at skera ígjøgnum og niðurleggja onkra tænastu hóast tað ger, at so koma onnur í trongstøðu.

## Trupul uppgáva

Frá Sernámsdeplinum hevur felagið Hoyrnin fingið at vita, at neyvan verður nøkur broyting til tað betra innan deyvaøkið, men at kanska verður rúm fyri onkrum skeiði komandi ár í teknmáli.

- Stovnurin er noyddur at útvega ein teknmálsráðgeva aftur, men eg bjóði ikki nøkrum eitt slíkt starv hálva tíð, tí tað er alt ov lítið til arbeiðsbyrðuna. Tískil er ikki vist, at teknmálsskeið verða komandi ár, men vit vóna tað, sigur Hans Eli Dahl.

Stjórin á Sernámsdeplinum metir, at hálv onnur millión krónur afturat oyramerkt til deyvaøkið, hevði munað væl.

- Tá ið alt sernámsfrøðiliga økið vantar pening, er tað ein ómetalig trupul uppgáva at gera av, hvørji øki skulu raðfestast og hvørji ikki. Tí hevði tað kanska verið frægari um játtanir vórðu oyramerktar til ymsu økini, hóast tað í ein mun setir leiðsluna á stovninum út av spælinum. Hevði Sernámsdepilin fingið hálva aðru mió. krónur meiri komandi ár, enn tað sum er væntandi, høvdu vit raðfest deyvaøkið ógvuliga høgt.

## Støðan kend

Landsins myndugleikar kenna støðuna og tørvin. Fyrr í hesum árinum søkti Sernámsdepilin um 5 mió. krónur í eykajáttan til alt virksemið fyri at røkka restina av hesum árinum nøktandi. Hetta varð ikki játtað. Við bit og slit vóru 350.000 kr. játtaðar, soleiðis at tvey deyv børn kundu byrja í fyrsta flokki í summar.

Í vár vísti Sernámsdepilin Mentamálastýrið á, at tørvur er á í minsta lagi hálvum øðrum starvi, um deyvaøkið skal virka nøktandi. Fulla starvið eigur at fara til skeiðsvirksemi, gerð av tilfari og annað, meðan hálva starvið eigur at verða brúkt til tilrættislegging, ráðgeving og annað.

- Tað snýr seg ikki bert um at útvega nakrar deyvalærarar, læra teir teknmál og so koyra teir í eina skúlastovu. Fyri at seta skjøtul á økið, er tørvur á vælskikkaðum fólki til nógvar uppgávur, vísti Sernámsdepilin á.

Men hóast hesa áheitan um meirjáttan, ikki bert til deyvaøkið, men til øll økini Sernámsdepilin varðar av, sæst lítið aftur til eina slíka í fíggjarlógaruppskotinum til komandi ár.

## Vandin

Deyvu børnini í Føroyum eru ikki nógv í tali, eini 10 í alt um allar Føroyar, og tískil hoyrast tey ikki væl í okinum sum er. Spurdur um tað ikki er vandi fyri, at tey detta burtur ímillum, tí tey eru so fá í tali, sigur Hans Eli Dahl.

- Tað kann avgjørt vera ein vandi fyri tí.

Aðra staðni eru umstøðurnar hjá teim deyvu og avvarðandi teirra ikki at samanbera við føroysk viðurskifti. Í Noregi fáa foreldur, sum fáa eitt deyvt barn, eina sokallaða foreldraútbúgving, ið er 40 vikur samanlagt í tíðarskeiðinum meðan barnið er í aldrinum 0-16 ár. Hetta svarar til tvær og eina hálva viku um árið. Umframt fáa foreldur onnur skeið í eitt nú deyvamentan og øðrum viðkomandi. Hetta gevur foreldrum høvi til at læra málið hjá barninum, so at tey kunnu samskifta á einum støði, sum er virðiligt.

# Arbeiða við eini loysn

**Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur biðið umsitingina kanna, um fígging kann útvegast, soleiðis at deyvaøkið verður betur fyri komandi ár**

DEYVAØKIÐ
*Turið Kjølbro*


*- Verður eitt hálvt starv normerað afturat, letur tað upp fyri møguleikum, sum ikki eru til í dag, sigur Óli Holm, landsstýrismaður*

Hóast Óli Holm, landsstýrismaður í mentamálum, hevur givið umsiting síni boð um at kanna, um fígging kann útvegast, soleiðis at deyvaøkið verður betur fyri komandi ár, torir hann ikki enn at geva foreldrum at deyvum børnum eina vón um, at tey sleppa á teknmálsskeið komandi ár.

- Finna vit eina loysn, kundi eitt hálvt ráðgevarastarv verið normerað afturat tí hálva, sum er normerað, sigur Óli Holm, landsstýrismaður.

Deyvaráðgevin, sum sat í hálvum starvi, segði seg úr starvi í summar vegna ov stóra arbeiðsbyrði. Uppgávurnar hjá viðkomandi svara til tvey fulltíðarstørv.

- Møguliga er tað ikki nóg mikið bert at normera eitt hálvt starv afturat, men allur bati bøtur. Verður tað hálva starvið veruleiki, letur tað upp fyri møguleikum, sum ikki eru til í dag.

Stjórin á Sernámsdeplinum sigur í blaðnum í dag, at hálv onnur miljón í meirjáttan til Sernámsdepilin hevði gjørt tað møguligt, at deyvaøkið varð væl hægri raðfest enn tað verður í løtuni.

- Handa upphæddin er ikki tøk í dag, sigur Óli Holm.

Spurdur um tað ikki er vandi fyri, at tey deyvu og avvarðandi teirra detta burtur ímillum, tí tey eru so fá í tali og ikki gera so nógv um seg, sigur Óli Holm.

- Tað meti eg avgjørt ikki. Øll, sum kenna eitt sindur til deyvaøkið, vita, hvussu týdningarmikið tað er.

# Nýggir sangir um Silva



*Nú kemur ein heil fløga við Silva-tónleiki*

**Kári Jacobsen hevur skrivað fýra nýggjar sangir um Silva. Sangirnir fáast á fløgu, sum Norðoya Sparikassi fer at lata sínum yngstu kundum fyrst í desember**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Um vikuskiftið vóru tríggir nýggir sangir um Silva at hoyra á sølustevnuni í Klaksvík. Silvi er maskotturin hjá Norðoya Sparikassa, og hann hevur longu fingið ein sang, sum hevur verið nógv at hoyrt.

Tað er Kári Jacobsen, sum ger tónleikin til Silva, og hann hevur skrivað og framleitt tríggjar nýggjar sangir. Hetta eru lættir poppsangir, sum eru skyldir við tann sangin, sum fólk kenna frammanundan. »Eg veit ein raskan harudrong« er ein vælsvingandi discosangur, sum uttan iva fer at verða nógv spældur.

## Kendur maður við

Umframt tríggjar nýggjar sangir, er eisini eitt sonevnt remix gjørt av Silva-sanginum. Og so finnast allir sangirnir í karokee-útgávu á fløguni. Til seinast er eisini ein video av Silva-sanginum, sum børnini kunnu síggja umvegis telduna.

Tað er Linda MacDonald, sum syngur sangirnar. Kári Jacobsen hevur saman við øðrum góðum fólki staðið fyri, spælt og ljóðblandað sangirnar.

Björn Engelmann hevur mastrað fløguna í Cutting Room í Stockholm. Hesin Engellmann er ikki hvør sum helst, tí hann hevur havt líknandi uppgávur fyri kenda poppbólkar sum til dømis Aqua.

Norðoya Sparikassi fer at lata sínum yngstu kundum fløguna frá fyrsta mánadegi í desember.



# Óførur skemtileikur

*Jan Gardar spælir Charley, sum alt í einum fær eina falska mostir*



**Tað er sjáldan, at tú sleppur at flenna alla tíðina eftir einum sjónleiki, men við Mostir Charley slepst ikki undan**

UMMÆLI
*Jógvan á Høvdanum (yngri)*

Nú veturin so smátt er byrjaður og kalt er úti, hevur Klaksvíkar Sjónleikarfelagið tikið stig til at seta ein sjónleik upp, sum áður er spældur í Klaksvík. Sjónleikurin snýr seg um mostirina hjá Charley, sum skal koma á vitjan. Øll problemini byrja, tá mostirin verður seinkað, og ein annar fer at lata, sum um hann er mostirin.

Leikpallurin er serstakliga flottur, og eingin ivi er um, at tað hevur tikið nógva og drúgva túið at seta pallin upp. Hugsast skal eisini um, at tað eru tríggir pallar, sum eru gjørdir til hendan leik, og hvør pallurin er vakrari enn annar.

Ja, sjálvt tá tú kemur inn at hyggja eftir sjónleikinum, fært tú eina snøgga og vælskipaða leikskrá, sum eisini kann nýtast sum kalendari heima. Flott, flott og original má sigast.

## Góðir leikarar

Leikararnir eru allir góðir, tó at tað eru onkrir leikarar, sum skara framúr. Hans Hjalti Skaale spælir tann forvirraði og forelskaði Jack, sum er sooo forelskaður í gentuni Kitty (Jenny Kastalag). Jan Gardar hevur leiklutin sum Charlie, sum er forelskaður í Anny (Jakobinu Jacobsen). Sum butlarin hjá Jack, Brasset, spælir Karl Marius Poulsen meistarliga.

Men tann, sum skarar framúr, er Per Johannessen. Hann hevur leiklutin sum Babbs, besti vinur hjá Jack og Charley, og sum eisini klæðir seg út sum tann falska mostirin.

Annars eru leikarar sum Jógvan Jacobsen (tænari), Øssur Hentze (Spittigue), Joan Heinesen (Ella), Peter J. Eliasen (Francids) og tann veruliga Mostir Charlie, sum verður spæld av Adelborg Linklett.

## Flenna alla tíðina

Eg havi einki uttan rós at geva leikinum Mostir Charley hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag. Ongantíð áður havi eg upplivað ein so stuttligan og áhugaverdan sjónleik. Sigast má, at leikstjórin hevur skapt eitt meistaraverk, sum seint verður gloymt av klaksvíkingum.

Tað er sjáldan, at tú sleppur at flenna alla tíðina eftir einum sjónleiki, men hesa ferð slepst ikki undan.

Eitt fantastiska flott og vælskrivað manuskript. Bravo.

Góða eydnu við sjónleikinum, tit í Klaksvíkar Sjónleikarfelag og hjartans tøkk fyri eina stuttliga løtu.


*Jakobina Jacobsen er onnur av gentunum, sum er orsøkin til, at Charley og Jack uppfinna eina falska mostir*

KEYP JÓLAGÁVUNA NÚ
- spar upp til 70%
Adidas T-Shirt
nú bert kr. 99,95
Spar upp til 150,-
Badminton ketsjari
nú bert kr. 299,-
Spar 401,-
Skjúrta + buksir
nú bert kr. 399,-
Spar 451,-
Soviposi
nú bert kr. 399,-
Spar 501,-
Adidas draktir
frítt val bert kr. 299,-
Spar 301,-
Og nógv onnur góð tilboð
Renniskógvar
nú bert kr. 499,-
Spar 401,-
Adidas taskur
nú bert kr. 199,-
Spar upp til 201,-
Ítróttur á Glyvrum
Tlf. 447399
P/F THOMAS DAM
Ítróttur · N. Finsensgøta 5 · Postsmoga 1108
FO-110 Tórshavn · Tlf. 311403 · Fax 319980 · e-mail: sportthd@post.olivant.fo